

# NEURO **REHABILITERING** eftir apopleksi

KLAKSVÍKAR SJÚKRAHÚS




# INTENSIV **REHABILITERING**

*Klaksvíkar Sjúkrahús veitir tíðaravmarkaða rehabilitering (endurmenning) í einum samanhangandi og málrættaðum samstarvi millum sjúkling, avvarðandi og rehabiliteringstoymi.*

**ENDAMÁL**
Endamálið er, at sjúklingurin sum hevur ella er í vanda fyri at fáa avmarkingar á tí kropsliga, sálarliga og/ella sosiala virkisførinum, fær eitt sjálvstøðugt og innihaldsríkt lív eftir tilburðin.

**REHABILITERING**
Rehabiliteringin verður veitt í samband við øll lívsviðurskiftini hjá sjúklinginum, og fevnir um ein samskipaðan samanhangandi og tvørfakligan innsats.

**UPPGÁVUBÝTI**
Rehabiliteringin verður veitt av einum tvørfakligum toymi við lækna, sjúkrarøktarfrøðingum, heilsurøkt-arum og ergo- og fysioterapeutum. Harumframt verða aðrir fakbólkar tiknir við, um tørvur er á hesum. Hesir eru audiologopædur, sálarfrøðingur, neurosálarfrøðingur, sálarrøðslu-viðgeri ella kostráðgevi.

**KONTAKTPERSÓNAR**
Sjúklingurin fær tillutað tveir kontakt-persónar á seingjardeildini. Leikluturin hjá kontaktpersónunum er, at vera toghaldari í rehabiliteringsgongdini og hava høvuðssamskifti við familjuna.

# SAMRØÐUR

**MÓTTØKU- OG VÆNTUNARSAMRØÐA**
Sjúklingurin verður boðin til eina móttøkusamrøðu. Tey sum luttaka eru, sjúklingurin saman við avvarðandi og tað tvørfakliga toymi.

Endmálið við samrøðuni er at skapa eitt grundarlag fyri einum góðum samstarvi og einum greiðum uppgávubýti millum sjúkling, avvarðandi og fakfólk.

Hetta er tengt at væntanum og førleikum hjá øllum pørtum.

Út frá samrøðuni verður mál sett og rehabilteringsætlan gjørd.

**MIÐVEGISSAMRØÐA**
Til samrøðuna er rehabiliterings-toymið, sjúklingur og avvarðandi. Sjúklingagongdin verður gjøgnum-gingin, málini verða eftirmett og nýggj mál verða sett.

Við miðvegissamrøðuna er greið ábending um útlitini. Til samrøðuna verður útskrivingardagur settur og tilgongdin til útskrivan fer í gongd.

Harumframt verður greinað, hvønn tørv sjúklingurin kemur at hava í samband við røkt, stuðul, bústað, bústaðarbroytingar og hjálpartól.

Í samráð við rehabiliteringstoymið og móttakandi geiran, verður skipað fyri heimavitjan, har mett verður um tørv á hjálpartólum og um tørvur er á bústaðarbroytingum.

**ÚTSKRIVINGARSAMRØÐA**
Útskrivingarsamrøðan er umleið eina viku áðrenn útskrivan. Til samrøðuna er rehabiliteringstoymið, sjúklingur og avvarðandi. Sjúklingagongdin verður gjøgnumgingin og sjúklingur og avvarðandi boða frá, hvussu tey hava upplivað gongdina.

Hetta er við til at tryggja dygdina. Fysio- og ergoterapeutarnir gera eina endurvenjingarætlan, soleiðis at rehabiliteringin heldur áfram eftir útskrivan. Heilivágslistin verður avstemmaður og um ynski er at fáa skamtan til heilivág, verður hetta gjørt. Sjúklingurin fær eina skrivliga útskrivingarsamrøðu heim við.

# PRAKTISK **KUNNING**

**REHABILITERINGIN**
Rehabiliteringin er á fleiriseingja-stovu á seingjardeildini. Á stovuni er sjúkrahússong, seingjarborð og klædnaskáp. Stovan hevur egið wc og bað. Um plásstrot er, kann tað koma fyri at sjúklingar verða flutt/ur á aðra stovu.

**VITJANARTÍÐIR**
Kl. 15.00 - 16.00 og kl. 19.00 - 20.00

Í serligum førum kann onnur avtala gerast um vitjanartíðir.

**TELEFONNUMMAR TIL DEILDINA**
404550. Um sjúklingurin hevur fartelefon, ynskja vit at avvarðandi so vítt gjørligt ringja á hesa - tó ikki ov seint á kvøldi.

**INTERNET**
Tað er ókeypis atgongd til internet á Klaksvíkar Sjúkrahús.

**ROYKING, ALKOHOL OG RÚSEVNI**
Klaksvíkar Sjúkrahús er roykfrítt, tó er tað loyvt at roykja á serliga avmerktum økjum. Sjúklingar sum eru innlagdir kunnu biðja um nicoretteplástur. Tað er strangliga bannað at drekka alkohol ella at brúka rúsevni.

**HONDREINFØRI**
Tað er av alstórum týdningi at hava gott hondreinføri. Hetta fyri ikki at spreiða smittu runt á sjúkrahúsinum.

**MÁLTÍÐIR**
Morgunmatur: kl. 08:00 – 09:00
Millummáltíð: kl. 10:00
Døgurði: kl. 12:00 – 12:30
Drekka: kl 14:00
Náttурði: kl. 17:15 – 18:00
Drekka: kl 20:30

Eitt kuldaskáp er uttanfyri stovu 8, har sjúklingar hava møguleika at goyma egnan mat. Umframt hetta er eitt kuldaskáp á gongini við smáum brellbitum og orkudrykkjum. Sjúklingar verða eggjaðir til at eta døgurða og náttурða í uppihalds-stovuni.

**MATUR TIL AVVARÐANDI**
Kantina er á sjúkrahúsinum, har avvarðandi kunnu keypa morgunmat, salat, døgurða og smyrjibreyð. Opið er til kl. 13:00 yrkadagar. Avvarðandi kunnu frítt fáa sær kaffi og te á seingjardeildini.

**KLÆÐIR**
Sjúklingar skulu hava egin klæðir við. Undirklæðir fáast frá sjúkrahúsinum.

Tað er av alstórum týdningi at klæðini eru praktisk og hóska seg til venjing. Tað er týdningarmikið at hava góðar skógvar, sum sita væl á fótinum.

### HEIM Í VIKUSKIFTINUM

At fara heim í vikuskiftinum síggja vit sum lið í rehabiliteringsgongdini. Møguleiki er at lána hjálpartól frá sjúkrahúsinum og tað verður skipa fyri heimahjálp um tørvur er á tí.

### VIT KUNNU VEITA KOYRING MILLUM

Sjúkrahúsið og heimið tá vitja verður heima í vikuskiftinum. Koyring kann tó bert veitast fríggjadag áðrenn kl.15:00 og aftur á sjúkrahúsið mánamorgun.

### ÚTGONGD FRÁ SJÚKRAHÚSINUM

Starvsfólkini á seingjardeildini skulu hava boð, um sjúklingurin fer út av sjúkrahúsinum.

### TAGNARSKYLDA

Øll starvsfólk sum starvast á sjúkrahúsinum hava tagnarskyldu, tí kunnu sjúklingar trygt venda sær til starvsfólkini um tey ynskja at deila eitthvørt um sína støðu. Rehabiliteringstoymi samskiftir dagliga um sjúklingagongdina. Sjúklingar avgera hvør skal vera vitandi um at tey eru innløgd.

# AT VERA **AVVARÐANDI**

Tá ein persónur fær ein heilaskaða ávirkar tað familju og vinir. Tað er sera ymiskt, hvussu avvarðandi uppliva hetta, og flestu hava tørv á hjálp og stuðul at megna ta nýggju støðuna og leiklutin.

Starvsfólkini á Klaksvíkar Sjúkrahúsi eru fús at vegleiða og svara spurn-ingum.

Samstarvið við avvarðandi er sera týdningarmikið fyri rehabiliterings-toymið og sjúklingin.

Avvarðandi geva týdningarmikla vitan um hvør sjúklingurin var áðrenn heilaskaðan.

Við tí vitanini ber til at fáa eina fjølbroytta mynd av sjúklinginum og harvið veita eina málrættaða rehabilteringsgongd.

SJÚKRAHÚS
VERKIÐ

# KLAKSVÍKAR SJÚKRAHÚS

SJÚKRAHÚSBREKKA 1
FO-700 KLAKSVÍK
TEL. +298 45 45 45
T-POSTUR: KS@KS.FO